Skúlastýrisfundur mikudag 07.09.26

KL. 17.00

Møtt:
Foreldraumboð: Theodor, Mass, og Trygvi, kommunuumboð: Tróndur og Annita, starvsfólkaumboð Eileen og skrivari: Anna Maria(skúlastjóri)

Kunning AMJ:
Hoyvíkar skúli hevði, áðrenn eg varð sett, tvey leiðslufólk til skúlastýrisfundi, stjóra og vara. Hetta hevur leiðslan viðgjørt á fundi og gjørt av at halda okkum til at einans skúlastjórin, sum er skrivari, møtir.

Skilhald

Anna Maria vísir á, at skúlastýrið skal gera atferðar/skilhaldsreglur. AT skúlastýrið skal gera av, Hhat góðtaka vit og hvat gera vit, tá ið næmingar fara út um mark.

Tryggvi sigur, at vit vísa mørk og mugu brúka samtiónsmøguleikarnar, og heldur ikki at skúlastýrið eigur at gera reglurnar. Hann vísir á, at mørk skulu haldast, og at skúlin má sanktionera. Næmingar bestemma ikki.

Mass sigur eisini at skúlin skal brúka sanktiónir teir sanktiónsmøguleikar, sum eru. Onkuntíð mugu næmingarnir merkja avleiðingarnar.

Eingin má kalla reyvarhol

Semja millum foreldraumboðini um, at uvs skal góðkenna leiðreglurnar.

Theodor nevnir orðini respekt og dissiplin. Visir á munin millum virðing og respekt, at respekt vísir til ein myndugleika, sum lærarin hevur. Theodor vil gjarna, at slík virði skulu merkja skúlan sum skjótast.

Telefonir
Theodor: Vit eiga at gera sum skúlastýrið á Tvøroyri

Tryggvi sigur, at so verður eitt sindur av roki í fyrstuni, men at so verður tað betri.

Theodor væntar, at foreldru bakka meira upp enn vit halda. Hann fortelur frá foreldrafundi hjá SSP, har politistur vísti á Some/appir, sum eru sera hættisligar fyri børn. Zumarang er farlig, eisini Let's dance

Anna Maria vísir á,a t skulu vit hava foreldrini við - so er umráðandi, at fáa foreldraumboðini inn á fund. Tá ber til at fara saman í gongd.

Theodor heldur, at knappatelefonir kunnu vera ein trygd.

Anna Maria heldur ikki, at knappatelefonin er heppin. Vit síggja, at næmingar, sum eru keddir ella óðir ringja við knappatelefon eftri forledrum, áðrenn lærarin sleppur til at vísa næminginum um sorgan. Lærarin veráur so at siga lopin um.

Spurningurin "Hvussu nógv yvirlata vit børn til tech-risar"

Theodor segði, at kenslan eftir SSP-fundin var forferdilig.

Annað

Tryggvi spurdi til skriv, sum lærarar hava latið uvs.

Theodor segði, at hann var kunnaður.

Anna Maria segði, at tað er trupult at greiða frá, men nevndi broytingar, óformelt vald, og at málið hevur persónligan dám, so til ber ikki at siga so nógv uttan at bróta tagnarskylduna.

Anna Maria Reinert Jensen, skrivari